## Ósannindi

– Vit hava hoyrt politikarar og serfrøðingar úttala seg um førda fiskivinnupolitikkin, nú Fiskavirking er koyrt í Skiftirættin til avtøku. At politikarar nýta slík høvi í royndini at vinna sær bíligan politiskan vinning, er ikki óvanligt. Men at "serfrøðingar" ótarnaðir sleppa at bera ósannindi í fjølmiðlunum, er at fara um mark.

Jacob Vestergaard sipar til samrøðu, sum útvarpið á middegi hósdagin hevði við ein av hesum serfrøðingum, har hesin segði, at størsta orsøkin til, at Fiskavirking ikki kláraði seg var, at rávørugrundarlagið hevði svikið.

– Ein av niðurstøðunum var, at tað var komin ov lítil fiskur upp á land, og tí kundi Fiskavirking ikki klára seg.

– Hetta er beinleiðis ósatt. Hví "serfrøðingurin" vartar upp við slíkum, veit eg ikki, men hann átti at sett seg betur inn í viðurskiftini, áðrenn hann úttalaði seg.

Jacob Vestergaard sigur, at tølini prógva, at rávrutilgongdin verið rættuliga støðug seinastu mongu árini.

– Upsin hevur verið høvuðsframleiðslan hjá Fiskavirking, og tá serliga veiðan eftir upsa hevur verið met góð, hevur rávørutilgongdin ikki verið trupulleikin. Av somu orsøk hava skipini hjá Fiskavirking havt serliga góðan fiskiskap seinastu árini.

Hann sigur, at Fiskavirking hevur haraftur at havt góðar møguleikar at kappast um rávøruna, eitt nú tí, at Kósavirkið hevur ligið stilt í eitt langt tíðarskeið.

– Fiskavirking var ein politisk verkætlan, sum var sett á stovn aftaná kreppuna í 90-árunum, hóast tað vóru fleiri, sum ávaraðu ímóti ætlan. Felagið hevur síðan byrjan havt trupult við at fáa endarnar at røkka. Vit minnast jú øll, tá Fiskasølan í 2004 var løgd saman við Fiskavirking í royndini at betra um tilverugrundarlagið hjá Fiskavirking, sigur Jacob Vestergaard í lesarabrævi í dag.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Krevur SEV til viðgerð í Tórshavnar Býráði

**PRÍSURIN Á STREYMI** Marin Katrina Frýdal, sum umboðar Tórshavnar Býráð í nevndini í SEV, krevur nú, at alt býráðið sleppur at siga sína hugsan um at hækka prísin á streymi

Áki Bertholdsen

Spurningurin um at hækka prísin á streymi 15 oyru fyri hvønn kilowatt tíma, skal nú standa sína roynd í Tórshavnar Býráði.

Marin Katrina Frýdal, býráðslimur í Havn, krevur nevniliga, at málið verður lagt fyri alt býráðið til viðgerðar.

Hon er ikki bara býráðslimur, tí hon er eisini nevndarlimur í Sev, har eitt samt býráð hevur valt hana.

Og sum nevndarlimur í Sev hevur hon tikið fult undir við uppskotinum um at hækka prísin á streymi 15 oyru fyri hvønn kilowatt tíma.

Men hetta vann ikki frama á eykaaðalfundinum í Sev í farnu viku, ikki minst tí at hennara egni borgarstjóri, Heðin Mortensen, við sínum 20 atkvøðum í skjáttuni, so staðiliga mælti frá at samtykkja tað, men heldur vildi hava Sev at endurskoða fíggjarætlanina.

Hann helt, at tað var seint at koma við hesum nú, tí kommunurnar hava lagt sínar fíggjarætlanir.

Men grundgevingarnar eru eisini, at í tíðum sum hesum, eigur Sev at halda akkurát, sum øll hini og at tað er ov grefligt at hækka prísin so nógv í einum.

### Fyri býráðið

Marin Katrina Frýdal stendur framvegis fast við, at Sev hevur bara ein møguleika og tað er at hækka prísin á streymi.

Tí hevur hon nú biðið um, at málið verður lagt fyri Tórshavnar Býráð, so at allir býráðslimir fáa høvi til at viðgerða spurningin og at taka støðu til málið.

Marin Katrina Frýdal vísir á, at spurningurin um at hækka prísin hevur ongantíð verið til viðgerðar í býráðnum og tí heldur hon, at allir býráðslimir eiga at fáa høvi til at siga sína hugsan.

Annars fer leiðslan í Sev at hava kunnandi fund við býráðið um støðuna og um avleiðingarnar av, at Sev ikki sleppur at hækka prísirnar.

Sum vit greiddu frá í blaðnum mikudagin, hevur Sev aftur eykaaðalfund 21. desember, har felagsskapurin enn einaferð fara at royna at fáa undirtøku fyri at hækka prísin.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Heðini Mortensen til blaðið í dag.

*aki@sosialurin.fo*




*Marin Katrina Frýdal, býráðslimur í Havn og nevndarlimur í Sev, stendur fast um, at tað var skeivt at kolldøma ætlanina at hækka prísin á streymi. Men í hesum spældi borgarstjórin í Havn ein týðandi leiklut og tí vil hon nú hava alt býráðið upp í leikin*

# Pensjónistarnir skulu eisini við

**SJÚKRAKASSAGRUNNUR** Pensjónistarnir skulu eisini hava sæti í nevndini í sjúkragrunninum, sum ætlanin er at seta á stovn

Áki Bertholdsen

– Landsfelagið hjá pensjónistum skal eisini fáa høvi at velja ein lim í nevndina í nýggja sjúkrakassagrunninum, sum ætlanin nú er at seta á stovn.

Tað heldur Ingrid Henriksen, sum er umboðsráðslimur í Havnar Sjúkrakassa.

Sum tað sæst í grein á síðu seks í blaðnum, tygum nú sita við í hondini, er ætlanin at stovna ein sjúkrakassagrunn.

Fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum og á privata arbeiðsmarknaðinum, skulu velja hvør sítt umboð í nevndina og tað sama skulu Sjúklingafelagið og Meginfelag Teirra Brekaðu. Og so skal landsstýrismaðurin í heilsumálum velja tann seinasta nevndarlimin.

Stovnsfæið til grunnin skal fáast til vega við ognunum hjá sjúkrakassunum, sum vórðu niðurlagdir í vár, nú Heilsutrygd varð sett á stovn.

Teir 11 sjúkrakassarnir skulu nú viðgera málið fyri at vita, um teir taka undir við málinum.

### Eisini eldri

Men tá ið Havnar Sjúkrakassi skal hava fund at viðgerða málið, fer Ingrid Henriksen at skóta upp, at Havnar Sjúkrakassi skal boða frá, at eisini Landsfelag Pensjónistanna skal velja ein nevndarlim.

Hon vísir á, at tey eldru eru ein stórur samfelagsbólkur og tann bólkurin, sum brúkar mest heilivág og fær flest viðgerðir.

– Tí eigur hesin bólkurin sjálvsagt eisini at fáa ein nevndarlim í nevndina fyri Sjúkrakassagrunnin, sigur hon.

– Hesin bólkurin eigur at verða beinleiðis umboðaður í grunninum við einum nevndarlimi, leggur hon afturat.

*aki@sosialurin.fo*

Meiri um sama evni á síðu 6